# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Eg havi fýra mánaðir eftir í embætinum, og eg havi enn vónir um at loysa kreppuna í Miðeystri, áðrenn eg gevist*

*Bush forseti*



*Frá fundinum í Hvítu Húsunum. Uttast til vinstru sæst John McCain og uttan til høgru Barrack Obama*

*Mynd: Polfoto)*

# Floksfelagarnir hjá Bush vrakaðu hansara bjargingarætlan

**Hóast amerikanski forsetin ávaraði um varandi kreppu og arbeiðsloysi vildu hansara republikonsku floksfelagar ikki taka undir við hansara bjargingaruppskoti**

Í gjárkvøldið hildu tey flestu, at George W. Bush, forseti, og ráðgevar hansara høvdu gjørt eitt bjargingaruppskot, sum bæði republikanararnir og demokratarnir í Kongressini kundu taka undir við. Men aftan á ein fund í gjárkvøldið var greitt, at floksfelagar forsetans eru ikki nøgdir við ætlan forsetans, og at teir sýta fyri at taka undir við henni, soleiðis sum hon er orðað.

- Tað er eingin avtala um hetta, og tað eru framvegis fleiri áskoðanir, segði republikanski senatorurin Richard Shelby.

Uppskotið, sum sambnært Bush og ráðgevum hansara, skal bjarga amerikanska búskapinum burtur úr kreppuni, er umfatandi. Eftir tí skal tað almenna yvirtaka veðskuld fyri einar 700 milliardir dollarar ella einar 3.500 milliardir krónur, og tað fer at kosta hvørjum einasta amerikanara, ungum sum gomlum, 2.300 dollarar ella einar 11.000 krónur.

Í gjárkvøldið vóru tey bæði forsetavalevnini, John McCain og Barrack Obama, í Hvítu Húsunum, har teir hittu George W. Bush, forseta og fleiri leiðandi kongresslimir. Aftaná kom fram, at tey republikonsku umboðini høvdu lagt sína egnu bjargingarætlan fram á fundinum í Hvítu Húsunum, og at alt síðani endaði í ruðuleika.

Tað eru serliga teir konservativu republikanararnir, sum eru ímóti, at tað almenna skal koyra 700 milliardir dollarar í kreppuraktar bankar og kredittfeløg. Teir bera ótta fyri, at hjálpin fer bara at útseta kreppuna, og at teir nógvu pengarnir tískil fara fyri einki.

Republikanararnir hava kortini játtað at samráðast um eina bjargingarætlan.

# 94 ára gamal ákærdur fyri krígsbrotsverk

**Ein krígsbrotsmannadómstólur í Serbia er farin undir at viðgera eitt mál ímóti tí 94 ára gamla Sandor Kepiro, sum er ákærdur fyri hópmorð undir seinna heimsbardaga**

Sambært serbiska ákæruvaldinum var, Sandor Kepiro, sem er ættaður úr Ungarn, við til at beina fyri í minsta lagi 2.000 serbum og jødum undir seinna heimsbardaga.

Sandor Kepiro var løgreglumaður og seinni hermaður undir heimsbardaganum. Hann bleiv tikin í 1944 og fekk tíggju ára fongsul fyri at hava tikið lut í einum hópdrápi í býnum Novi Sad í januar í 1942. Har blivu fleiri hundrað húski myrd og líkini tveitt í eina á. Men Sandor Kepiro slapp undan at fara í fongsul, tí ungarskir fasistar fríaðu hann og hjálptu honum at flýggja til Argentina aftan á krígg-ið.

Nú hava serbisku myndugleikarnir gjørt av at taka málið uppaftur, hóast tann gamli løgreglumaðurin og hermaðurin er vorðin 94 ára gamal. Sjálvur hevur Sandor Kepiro sýtt fyri at koma til Beograd, og eins og í 1944 heldur hann uppá, at hann er ósekur.

# Pakistanskir hermenn skutu eftir NATO-tyrlum

**Amerikonsku álopini á marknaleiðini geva yvirgangsmonnunum vind í seglini, sigur pakistanski forsetin**



*Pakistanski forsetin hevði eina mynd av konu síni, Benazir Bhutto, við á røðarapallin í ST*

*Mynd: Polfoto*

NATO-leiðslan í Afghanistan hevur váttað, at tað bleiv skotið eftir nøkrum NATO-tyrlum á marknaleiðini millum Afghanistan og Pakistan, men leiðslan heldur uppá, at tyrlurnar vóru afghonsku megin markið.

Tað er ikki rætt, siga pakistonsku myndugleikarnir. Teir hava eisini váttað, at skotið varð eftir NATO-tyrlunum, men siga, at tyrlurnar komu inn um pakistanska markið, og at hermenninir tí skutu ávaringarskot eftir teimum.

Amerikanskir embætismenn royna at doyva orðalagið og tíðindini um tilburðin. Ein talsmaður hjá verjumálaráðnum Pentagon segði í nátt, at talan var um eitt hendiligt mistak.

Pakistanski forsetin, Asif Ali Zardari, segði í New York í gjár, at Pakistan kann ikki góðtaka, at fremmant hervald kemur inn um landsins mark. Hann segði eisini, at amerikonsku álopini á mál pakistonsku megin markið við Afghanistan koma yvirgangsmonnunum væl við og eru við til at økja mótstøðuna ímóti USA og tess sameindu.

- Nógvir pakistanar spyrja, um teir standa einsamallir í bardaganum ímóti yvirgangi, segði forsetin, sum er á ST-aðalfundi í New York.

## STUTT SAGT

### Byggja pyramidu í París

Býráðið í París samtykti í gjár at játta einum felagi at byggja eini háhús í býnum, og er hetta tað fyrsta háhúsið, sum verður bygt í franskahøvuðsstaðnumsíðani í sjeytiárunum. Tað kemst av, at tey seinastu 30 árini hevur tað ikki verið loyvt at byggja hús, sum eru hægri enn 37 metrar.

Sveisisku arkitektarnir Jacques Herzog og Pierre de Meuron hava teknað háhúsið, ið verður sum ein pyramida, og sum skal standa undir liðini á ráðstevnubygninginum Porte de Versailles, sum er sunnan fyri tornini Eiffel og Montparnasse.

Bertrand Delanoe, sum er borgarstjóri í París, sigur við franskar fjølmiðlar, at tað nýggja háhúsið verður umhvørvisvinarligt og harafturat sera vakurt á at líta.

Tað er felagið Unibail, sum letur húsið byggja, og tað skal hýsa skrivstovum, ráðstevnuhølum og einum hotelli. Gongst sum ætlað, verður tað liðugt í 2012.



*Pyramidan í París verður 200 metrar høg*

*Mynd: AFP*

### Motlanthe forseti fyribils

Í Suðurafrika hevur tjóðartingið valt Kgalema Motlanthe til forseta eftir Thabo Mbeki, sum bleiv noyddur at leggja frá sær. Tað var stjórnarflokkurin ANC, sum gjørdi av at skifta forseta.

Nýggi forsetin, sum er næstformaður í stjórnarflokkinum, skal eftir ætlanini røkja forsetaembætið, til forsetaval verður í Suðurafrika næsta ár. Tá verður formaðurin Jakob Zuma ætlandi valevni hjá ANC.